Aðalfundur Skipara- og Navigatørfelagsins:

# Brimil til viðgerðar

**Hósmorgunin hevði Føroya Skipara- og Navigatørfelag aðalfund í Norðurlandahúsinum. Størsti parturin av formansfrágreiðingini snúði seg um ósemjuna um nýggja vaktarskipið Brimil, sum enn liggur við bryggju í Noregi. Enn er eingin loysn at hóma**

AÐALFUNDUR
*Stefan í Skorini*



*Ellintur Abramsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, greiddi frá um virki felagsins í farna ári í Norðurlandahúsinum hósmorgunin. Formansfrágreiðingin snúði seg mest um Brimil*

Ellintur Abrahamsen, formaður, legði fyri við frágreiðing um virki felagsins í farna ári. Hann heldur, at árið 2000 hevur verið sera ójavnt sammett við onnur ár.

Ellintur Abrahamsen greiddi frá teimum sáttmálunum, ið felagið hevur við teir ymsu skipabólkarnar. Tann parturin, ið var mest rúgvismikil, var um sáttmálaviðurskiftini fyri vaktar- og bjargingarskipini.

Hesin sáttmálin kann sigast upp 1. mars 2002, men tó stendur í sáttmálanum, at "tá nýggj skip koma, skal samráðing vera millum Fíggjarmalastýrið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag um bólking av teimum".

Samráðingar hava verið millum Fíggjarmálastýrið øðrumegin og Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið hinumegin. Hesar samráðingar hava verið drúgvar, men eru endaðar úrslitaleysar.

Stóri knúturin er, at fíggjarmálastýrið ikki vil eftirlíka teimum lønarkrøvum, sum fakfeløgini hava sett fram.

Skipara- og Navigatørfelagið krevur, at yvirstýrimenn fáa minst 28.000 krónur um mánaðin, meðan stýrimenn skuldi fáa nakað lægri og skiparar nakað hægri.

Ellintur Abrahamsen vísir á, at einki samsvar er millum arbeiðið, ábyrgd og løn. Tí skal Brimil flokkast øðrvísi enn Tjaldrið. Hann vísir tó á, at best hevði verið, um Brimil og Tjaldrið vórðu eins flokkað.

Á fundi 16. oktober legði fíggjarmálastýrið nýggja lønaravtalu á borðið, sum bjóðaði skiparum eina mánaðarløn á 24.191 krónur. Hækkingin var 783 krónur.

Ellintur Abrahamsen vísti á aðalfundinum á, at hetta uppskotið als ikki kundi góðtakast av tveimum orsøkum. Tann fyrra er, at lønarhækkanin er alt ov lág, og tann seinna er, at hon ikki fevnir um allar bólkar.

Dagin eftir legði Skipara- og Navigatørfelagið sítt lønaruppskot fram fyri fíggjarmálastýrið. Har varð skotið upp, at 10% vórðu løgd afturat hjá einum dekkara í dag. Síðani skuldi lutfallið frá fyrsta sáttmálanum frá 1977 millum dekkara og 1. stýrimann, dekkara og yvirstýrimann og millum dekkara og skipara brúkast umaftur.

Hesum uppskoti vildi fíggjarmálastýri ikki ganga á møti, og samráðingarnar slitnaðu.

20. oktober hevði Skipara- og Navigatørfelagið lýsing í útvarpinum, har boðað varð frá, at felagið noktar limum sínum at sigla við Brimli, tí sáttmálaviðurskiftini ikki vóru komin í rættlag. Limir kundu tó arbeiða umborð á skipinum.

### Steðga lønum

Ellintur Abrahamsen vísti í formansfrágreiðingini á, at felagið hevði tvinnar kostir í at velja. Hvørgin var mjúkur. Annaðhvørt góðtók felagið treytirnar frá fíggjarmálastýrinum ella varð neyðugt at nokta limunum at sigla við Brimli.

Formaðurin segði á aðalfundinum, at hóast fíggjarmálastýrið hevði hótt við at steðga lønargjaldingum, so var tað teimum greitt, at hetta var brot á sjómanslógina.

Hann legði afturat, at tað hevði verið brot á bæði sjómanslógina og á avtalur millum Føroya Landsstýri og Skipara- og Navigatørfelagið, um skipari og manning sigldu við Brimli, tá eingin sáttmáli er millum partarnar.

Nevndin boðaði frá, at felagið fór at gjalda lønir, um fíggjarmálastýrið fór at steðga lønarútgjaldingum.

Fíggjarmálastýrið steðgaði lønunum hjá teimum, sum vóru á Brimli, 23. oktober.

### Gerast tænastumenn

1. desember kallaði fíggjarmálastýrið aftur til fundar. Fiskimálastýrið var eisini til staðar, og Kaj P. Mortensen skeyt upp, at manningin á vaktar- og bjargingarskipum blivu tænastumenn.

Orsøkin er, at hetta hevði tikið verkfalsrættin frá teimum.

Fíggjarmálastýrið vísti á, at so verður tænastumannafelagið umboð hjá skiparum og manning.

Nevndin hevði tó eina greiða støðu hesum viðvíkjandi, sigur Ellintur. Um navigatørarnir skulu gerast tænastumenn, so skal Skipara- og Navigatørfelagið framvegis verða teirra umboðandi felag. Hetta var eitt krav.

Fíggjarmálastýrið kom síðani við enn einum lønaruppskoti. Eisini varð sagt, at tað ber ikki til, at manningarfeløgini umboða limirnar, um teir gerast tænastumenn. Skipara- og Navigatørfelagið vrakaði eisini hetta uppskotið.

Skipara- og Navigatørfelagið hevur í sambandi við lønarviðurskifti lagt uppskot fram tann 8. desember.

Enn hevur Føroya Skipara- og Navigatørfelag einki svar fingið.

Ellintur Abrahamsen sigur seg ikki vita, hvat fer at henda víðari í hesum málinum. Hann vónar bara, at garanti tíðin verður roknað frá tí, at skipið fer úr Noregi.



*Nevndin í Skipara- og Navigatørfelagnum veit ikki hvat hendir við Brimli*

# Skulu bera seg skjótt at við tilbúgving

TILBÚGVING
*Jan Müller*

Sambart Útvarp Føroya mikudagin fer landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum nú at gera eitt uppskot um, hvussu MRCC-tilbúgvingarskipanin (Maritime Rescue Coordination Center) kann setast í verk í Føroyum. Hetta er í tøkum tíma, tí 1. apríl skal skipanin vera klár. Verður hon ikki klár so mugu oljufeløgini til at endurskoða sínar ætlanir um at bora á føroyska landgrunninum komandi summar.

Útvarpið veit at siga, at Fiskimálastýrið má til at biðja um eina eykajáttan, um tað skal bera til at fáa tilbúgvingarskipanina upp at standa til tíðina.

Ein MRCC stovnur skal samskipa bjarging og leiting á sjónum. Hetta er nakað, sum oljuvinnan setir sum krav fyri at fara undir leiting eftir olju á sjónum.

Málið var fyri á landsstýrisfundi seinasta fríggjadag. Tá varð samtykt, at Fiskimálastýrið skal gera eitt uppskot til eina MRCC-skipan.

Verður skipanin ikki klár 1. apríl er vandi fyri, at eingin boring verður næsta ár vil útvarpið vera við. Jørgen Niclasen, landsstýrismaður sigur við útvarpið, at ein møguleiki er, at skotar røkja uppgávuna úr Aberdeen. Teir eru vanir við at arbeiða við slíkum . Men henda møguleika dámar landsstýrismanninum einki. Serliga tí at tað sambart oljulóggávuna verður mett rættast, at vørur og tænastur skulu fara um føroyskan keikant. Ein annar møguleiki er so at fáa danir, sum longu taka sær av bjargingaruppgávum í Føroyum, at taka henda táttin við eisini. Men heldur ikki tað heldur landsstýrismaðurin vera nakra góða loysn. Hann heldur bestu loysnina vera, at vit menna okkara egnu tilbúgving.

Hann fer tí at heita á løgtingið um at fáa eina eykajáttan uppá einar 20 mill kr. til at keypa gomlu telegrafstøðina, har Tórshavn Radio í dag heldur til. Ein fyrimunur við at leggja tænastuna har er, at har er vakt alt samdøgrið. Kai Mortensen, stjóri í Fiskimálastýrinum segði við Sosialin herfyri, at teir verða klárir við MRCC-støðini og tilbúgvingini fyri eitt nú oljuleiting í seinasta lagi 1. apríl.



# Breiður meiriluti fyri føroyskari løgreglu

**Stórur partur av andstøðuni, nevniliga Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin, tekur undir við ætlanini hjá landsstýrinum um at taka yvir løgregluna. Men føroyskir politistar kenna seg ótryggar við hesa ætlan**

Yvirtøka
*John Johannessen*

Landsstýrið ætlar at yvirtaka løgregluna í hesum valskeiðnum. Hesum hevur Høgni Hoydal, varaløgmaður, boðað frá, og hesum tekur meirilutin í andstøðuni undir við.

– Í uppskoti okkara til eina sjálvstýrislóg stendur, at tað er týdningarmikið, at vit hava ræði á dómsvaldi og løgreglu. Tí er tað heilt náttúrligt, at vit taka undir við einum slíkum uppskoti, sigur Hans Pauli Støm úr Javnaðarflokkinum.

Somu fatan hevur Jenis av Rana úr Miðflokkinum. Hann sigur ongan iva vera um, at hann fer at atkvøða fyri einum uppskoti um at taka yvir løgregluna. Men Jenis av Rana ger samstundis vart við, at tað er týdningarmikið, at trygdin fyri borgararnar verður tann sama við einari føroyskari løgreglu og at starvs- og sáttmálaviðurskiftini hjá løgreglufólkunum eru trygg.



*Allir flokkar á tingi uttan Sambandsflokkurin taka undir við at yvirtaka løgregluna*

### Ivasom løgreglufólk

Júst starvs- og sáttmálaviðurskiftini í einari føroyskari løgreglu eru føroyskir politistar bangnir fyri. Tí eru 80 prosent av limunum í Føroya Politistafelag ímóti, at løgreglan verður yvirtikin. Men Høgni Hoydal hevur boðað frá, at føroyskir politistar sjálvsagt skulu vera við til at skipa eina føroyska løgreglu og at sáttmálaviðurskiftini skulu tryggjast.

Sambandsflokkurin er einasti flokkur, ið ikki tekur undir við, at løgreglan gerst føroyskt Edmund Joensen ger greitt, at líkamikið hvussu eitt uppskot um at yvirtaka løgregluna verður snikkað saman, fer Sambandsflokkurin at atkvøða ímóti tí. Sambandsflokkurin heldur, at felags løgregla er eitt av grundleggjandi málunum í einum ríkisfelagsskapi. Tí kemur tað ikki upp á tal hjá Sambandsflokkinum at yvirtaka løgregluna.

### Ikki nóg mikið

Hans Pauli Strøm úr Javnaðarflokkinum heldur tað ikki vera nóg mikið at yvirtaka løgregluna. Hann vísir á, at løgregla og dómsvald hoyra saman, og tí heldur hann tað vera eins umráðandi at yvirtaka dómsvaldið og at orða eina føroyska revslilóg.

– Vit skulu hava eitt føroyskt lógarverk á øllum tí rættarliga økinum, eins og vit skulu hava føroyskt dómsvald og føroyska løgreglu. Tað er eisini hetta, sum vit hava víst á í okkara uppskoti til eina sjálvstýrislóg, sigur Hans Pauli Strøm.

At fremja hetta í verki krevur nógva fyrireiking, tí heldur Hans Pauli Strøm, at løgtingið átti at sett eina serstaka nevnd at gjørt rammurnar til eina føroyska rættarskipan.

Ein slík nevnd er í løtuni til. Men talan er um eina undirnevnd í grundlógarnevdini, og tað heldur Hans Pauli Strøm ikki vera nóg gott.

– Tá landsstýrið kom við uppskotinum um at seta eina grundlógarnevnd, var Javnaðarflokkurin ímóti, at hendan nevndin eisini skuldi gera eina føroyska rættarskipan. Hetta hildu vit kravdi eina serstaka nevnd, og tað halda vit framvegis, sigur Hans Pauli Strøm.

Jenis av Rana sigur tað vera týdningarmikið, at føroyingar reisa seg á føtur á so nógvum økjum, sum yvirhøvur gjørligt. Tí tekur hann eisini undir við einari føroyskar rættarskipan.

### Tekur drúgva tíð

Høgni Hoydal segði við Útvarpið mikukvøldið, at hann roknaði við, at tað fór at eydast at yvirtaka løgregluna í hesum valskeiðnum. Hesum roknar Hans Pauli Strøm ikki við.

– Landsstýrið hevur síðani samgongan varð skipað roynt at yvirtikið Skipasýnið, men enn er einki hent. Og at yvirtaka løgregluna er ikki bara sum at siga tað. Føroyska løgreglan má skipast so hon hóskar til millum annað Schengen samstarvið, og hetta fer at seta hørð krøv, tí Føroyar liggja nevniliga í útjaðar-anum av samstarvinum, og tí verða tað vit, ið skulu fremja eftirlitið fyri hini londini í samstarvinum, vísir Hans Pauli Strøm á.

Hans Pauli Strøm leggur dent á, at tað er týdningarmikið, at arbeiðið at yvirtaka løgregluna verður væl fyrireikað.

Løgreglan er B mál í heimastýrislógini. Tað merkir, at landsstýrið skal leggja uppskot til samtyktar fyri løgtingið um at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um at yvirtaka løgregluna. Tá hetta so er samtykt, skal landsstýrið samráðast við danir um yvirtøkuna, og at enda skal støða takast til úrslitið. Hetta er ein drúgv mannagongd. Men løgmaður hevur meldað út, at danska stjórnin og landsstýrið í næstum fara at gera broytingar í heimastýrislógini, so tað verður léttari at yvirtaka. Og hugsandi er, at hesar broytingar eru at taka burtur lista B, so flest øll málsøki kunnu yvirtakast eftir lista A. Yvirtøka eftir lista A kann fremjast við løgtingssamtykt.

Beint áðrenn evstamark hjá blaðnum eydnaðist at fáa viðmerking frá Jóannes Eidesgaard, formanni Javnaðarfloksins. Hann sigur, at tað er umráðandi, at vit fáa lógarkarmin til vega, so tað er løgtingið, ið avgerð nær málsøki verða yvirtikin, hvørji málsøki verða yvirtikin og hvussu tey verða yvirtikin. Tí vil Jóannes Eidesgaard ikki beinleiðis gera viðmerkingar til, um tað er rætt at yvirtaka løgregluna í hesum valskeiðnum, bert tí Høgni Hoydal ella føroyska pressan velur at taka málið upp beint nú í góðum jólahýri.

Høgni Hoydal roknar við, at tað kemur at kosta 63 milliónir at yvirtaka løgregluna.

## Tvær nýggjar bussrutur

BUSSRUTUR
*Tíðindaskriv*

Tann 1. januar byrja tvær nýggjar bussrutur í Tórshavnar kommunu. Kollafjarðarleiðin, sum hevur fingið heitið Leið 5. Koyrt verður soleiðis: Farstøðin - R.C.Effersøesgøta - Hvítanesvegur -Sandvíkarhjalli - Kollafjørður, har koyrt verður eftir bygdavegnum, frá býlinginum Langasandur til Kjalnesar, og síðani eftir landsvegnum til Norðuri í Sundum. Síðani eftir bygdavegnum til býlingin Langasandur - Sandvíkarhjalli - Hvítanesvegurin - R. C. Effersøes gøtu - Farstøðin.

Fyrsti túrurin gerandisdagar verður koyrt gjøgnum Vesturbýin, tá komið er aftur úr Kollafirði.

Minni bussur kemur at koyra til Signabø og Oyrareingir, yvir til høvuðsvegin í sambandi við leiðina.

Til tann 20. januar, tá koyrandi er aftur eftir Marknagilsvegnum, verður koyrt eftir Svalbardsvegnum og Landavegnum, í sambandi við fyrsta túrin gerandisdagar.

Leið 6 Verður broytt soleiðis, at koyrt verður:

Farstøðin - Steinatún - Landssjúkrahúsið - Argja skúli - Hamaran á Argjum - Argja skúli - Tekniski skúlin - Handilsskúlin - Norðurlandahúsið - rundkoyringin á Hálsi - Studentaskúlin - Mjólkavirkið - á Flat - Berjabrekka - rundkoyringin á Hálsi - tyrlupallurin Yviri við Strond - Farstøðin.

Til tann 20. januar, tá koyrandi er aftur eftir Marknagilsvegnum, verður koyrt eftir Landavegnum og Svalbardsvegnum.

Ferðaætlan: Arbeitt verður við at gera eina nýggja ferðaætlan, sum umfatar allar leiðirnar hjá bussleiðini í Tórshavnar kommunu, t.e. leið 1, 2, 3, 4 (Kaldbak), 5 (Kollafjørð), 6 (nýggja leiðin í Havn), og verður henda ferðaæltan væntandi liðug, soleiðis at hon kann koma út 1 februar.

Lýsing av nýggju leiðunum: Nýggju leiðirnar verða lýstar í hesi vikuni, í bløðunum, í bussunum, kiosk Steinatún og í Snarskivuni.